UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Dagfesting: **1. november 2021**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 21/08502-37**

Svar

upp á

skrivligan fyrispurning nr. 52-072/2021 eftir § 52 a í Tingskipanini frá Djóna Nolsøe Joensen, løgtingsmanni, um landskassastuðul til nýbygging av kirkjum, settur Jenisi av Rana, landsstýrismanni í uttanríkis- og mentamálum.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Ætlar landsstýrismaðurin at veita landskassastuðul, tá nýggjar kirkjur skulu byggjast í Føroyum?
2. Eru nakrar ítøkiligar umsóknir í Uttanríkis- og mentamálaráðnum um landskassastuðul til nýggjar kirkjur, og um so er, hvussu leingi hava tær verið til viðgerðar í ráðnum?

Svar

Til 1: Ja. Eg havi áður boðað frá, at eg haldi tað vera sjálvsagt, at landið brúkar heimildina í § 30 í løgtingslóg um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar, og stuðlar kirkjubygging serliga, umframt tann 20% stuðul, sum liggur í, at kirkjubygging – eins og alt annað ikki vinnuligt, almannagagnligt frítíðarvirksemi, har í minsta lagi 33% av samlaða íløgukostnaðinum eru útvegað sum gáva ella við óløntum, sjálvbodnum arbeiði – fær meirvirðisgjaldið endurgoldið.

Hetta verður tó eisini at valdast um vælvild Løgtingsins í hvørjum einstøkum føri, tí talan kann vera um stórar upphæddir, ið ikki rúmast innan vanliga játtanarkarm ráðsins.

Til 2: Nei. Stuðulin kann, sambært § 30, stk. 2 í løgtingslóg um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar, ikki verða verða veittur, fyrr enn landsstýrismaðurin, sambært løgtingslóg um bygningar fólkakirkjunnar hevur givið endaligt loyvi til, at kirkja verður bygd, og eg havi ikki fingið tilmæli um at geva nakað slíkt loyvi.

Men ein umsókn um at geva endaligt loyvi til at byggja kirkju hevur verið til viðgerðar í ráðnum síðani 20. august 2021. Henda umsókn kom eisini til viðgerðar í ráðnum 3. mars 2021, men ráðið legði hin 23. apríl 2021 málsviðgerðina stilla, tí neyðugt var, at kirkjuráðið greiddi greiniligari frá ymsum viðurskiftum, áðrenn málsviðgerðin kundi halda fram.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður